# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Erla Johanna Joensen**, født Hammer, ættað av Toftum, búsitandi í Keypmannahavn, einkja eftir Sigmund Joensen av Tvøroyri, andaðist sunnudagin tann 22. juli, 86 ára gomul. Kórsetingin verður fríggjadagin 27. juli klokkan 12 í Hyltebjerg kirkju, Ålekistevej 91, 2720 Vanløse.

Mánadagin 23. juli andaðist **John Larsen, Vágur**, sonur Lydiu og Petur Larsen, Porkeri, á Ríkissjúkrahúsinum, 52 ára gamal. Kistan kemur suður við Smyril í kvøld klokkan 20.30. Kistan fer úr heiminum hóskvøldið klokkan 19.00 í Bethel. Jarðarferðin verður úr Bethel fríggjadagin kl. 13.00.

†

Mánadagin 23. juli andaðist á Ríkissjúkrahúsinum okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**John Larsen**
Vágur

Sonur Lydiu og Pidda Larsen, 52 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági fríggjadagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Irena.**
**Siri, Páll og Lív**

Tey, ið vilja minnast John, kunnu lata eina peningagávu til Nýrafelagið. Konta í peningastovunum.

**Dagurin**

**26. juli, Anna.** Hon var móðir Mariu Moy og var gift við Jójakimi. Halgisøgan sigur frá, at tey komin upp í árini eingi børn fingu, og Jójakim rýmdi frá konuni. Men hann vendi heim aftur, tá ið ein eingil hevði boðað honum, at tey skuldu fáa barn. Og tá bar til. Hebráiskt navn, ið merkir hin náðaða ella yndi.

# Niels Holm Jacobsen, 85 ár

Seinasta sunnudag, 22. juli, fylti ein kendur hvalbingur, Niels Holm Jacobsen, 85 ár.

Foreldrini hjá Niels vóru Jákup úr Skálavík kallaður, ættaður úr Leynum, og Elisabeth, dóttir Jóan Paula við Neyst í Hvalba.

Niels var smádrongur, tá ið mamman doyði frá fimm børnum, og tað minsta barnið var ikki ársgamalt. Systkini vóru annars Jóhannes, Ragnhild, Kristiannna og Thala. Heimið varð hildið saman av Oluffu Wolles av Trøllanesi, sum var arbeiðsgenta hjá teimum í 11 ár. Oluffa giftist seinni við Jóhannes í Miklagarði á Eiði.

Hesar umstøður í heiminum skaptu eisini eitt serligt samanhald millum systkini. Minnist, at Esmar Fuglø, giftur við Ragnhild, ofta plagdi at taka til "Niels svágur", sum segði so og so. Tá nakað var, so ringdi Esmar til Niels.

Sum aðrir dreingir fór Niels ungur til skips, og sigast kann, at sjógvurin gjørdist hansara lív.

Fyrsta skipið hjá Niels var City of Norwich, har Gunnar Danielsen, ættaður úr Søldarfirði búsettur í Vági, var skipari. Undir krígnum sigldi hann við trolaranum Norðbúgvanum við Hans Paula Johannesen sum skipara. Her var hann saman við Jakku á Sundi, hvørs søga, eisini frá Norðbúgvanum, hevur verið í Sosalinum herfyri. Jakku letur væl at Niels sum ein raskan skilamann.

Men Niels mátti gevast at sigla, tí hann fekk tuberklar, og var hann rættiliga ringur. Hann fekk viðgerð bæði í Føroyum og Danmark og gjørdist arbeiðsførur aftur. Hann tók skiparaprógv í 1948.

Niels kom at royna nógvar tættir av sjólívinum. Hann var í fleiri ár skipari á hvalabáti hjá teimum hjá Dias á Heyggi, sum høvdu hvalastøðina í Lopra, og gekk tað væl. Teir royndu eisini at skjóta brugdur, sum vórðu veiddar fyri teirra nógva livur. Niels kom eisini at royna veiðu eftir ídnaðarfiski, tá ið henda veiðan stakk seg upp, og hann var við Gudmundi hjá Niels Juel Mortensen á Tvøroyri.

Hann var eitt skifti skipari á Stapanum, sum førdi kol kring landið fyri



*Mynd úr løgtingsbókin*

kolavirkið hjá hvalbingum. Tað var eisini Niels, sum var við til at keypa útróðrarbátin Glyvrarberg til Hvalbiar. Niels førdi hann, tað gekk óføra gott hjá honum at fiska.

Ein annar táttur hjá Niels var politikkur. Hann var valdur í kommunustýrið fyri Hvalbiar sókn í 1951 og sat til 1958. Hann varð valdur inn á Føroya løgting fyri fólkaflokkin árini 1958-1966, og gjørdist hann ein partur av sjálvstýrssamgonguni 1962-1966. Um hesa tíðina varð eisini byrjað at senda úr tinginum í útvarpinum. Tey, sum minnast hesa tíð, minnast eisini Niels sum ein framúr røðari við greiðum og klárum sjónarmiðum, sum tað var lætt at vera samdur við, í hvussu er hjá teimum sjálvstýrissinnaðu. Tey vóru fleiri, sum undraðust og harmaðust um, at Niels ikki skuldi verða afturvaldur til løgtingsvalið í 1966. Síðan tá hevur fólkaflokkurin í Suðuroy ikki verið umboðaður á tingi. Árini 1963-1966 var Niels formaður í nevndini fyri Lønjavningargrunnin, valdur av landsstýrinum, og kom hann tá beinleiðis at hava við viðurskifti fiskimanna at gera.

Niels var giftur við Silvurbjørg av Tvøroyri. Tað eru mong ár síðan, at hon doyði.

Hóast í seinna lagi fara vit at ynskja Niels hjartaliga tillukku við teimum 85 árunum.

**ó.**



*Her eru øll systkini saman. F.v. Niels, Jóhannes, Ragnhild, Thala og Kristianna*

# Emly Poulsen 80 ár



31. juli fyllir Emly Poulsen á Skáltavegnum í Klaksvík 80 ár.

Mamma er vaksin upp við Keldu í Leirvík, hon er næstelst av 13 systkjum.

Hon fór sum ung til Havnar at tæna og har møtti hon Julian úr Øravík, sum hon giftist við í 1950. Tey fluttu til Klaksvíkar at búgva 1954. Hann doyði eftir ringa sjúkralegu 1985. Mamma passaði hann líka til tað seinasta.

Tey fingu 7 gentur sum allar eru giftar og búgva ymsa staðni í Føroyum.

Mamma eigur 18 ommubørn og 14 langommubørn, sum hon við stórun áhuga fylgir.

Hon fór út at arbeiða, tá børnini vóru undankomin. Fyrst á flakavirkinum, síðani á Vistarheiminum, har var hon sera glað fyri at vera.

Mamma hevur altíð tikið sær nógv av børnunum og ommubørnunum, passað tey og ikki minst bundið upp á tey. Hon hevur altíð dugað sera væl til hendurnar, bæði at seyma og binda. Tað besta hon fær er, tá onkur kemur at vitja, hon er sera blíð og løtt at práta við.

Hon hevur ein stóran áhuga, sum kanska ikki er so vanligur í hennara aldri, tað er ítrottur, serliga fótbóltur, hon fylgir væl við, hvussu gongur við KÍ og LÍF.

Mamma heldur føðingardagin í Skálanum í Klaksvík týsdagin 31. juli kl 17, og vit vóna, at nógv fólk koma at heilsa uppá hana.

**Heilsan døturnar**